# Føroyar fastan sess í ST

Í øðrum og triðja punkti í niðurstøðuni á landsfundi Sambandsfloksins, viðger fundurin útbúgving og Føroyar fram í altjóða samfelagnum. Skúlar skulu dagførast, og útbúgvingarstigið fyri lærarar og pedagogar skal hækkast líðandi. Tær maritimu útbúgvingarnar skulu eisini raðfestast hægri, eins og Vinnuháskúlin skal gerast ein hægri altjóða lærustovnur innan maritimar útbúgvingar. Landsfundurin heldur, at útbúgvingarstuðul skal veitast lesandi frá 16 ára aldri, og altjóða "seafood management" útbúgving skal setast á stovn á Fróðskaparsetrinum. Í brotinum um, at Føroyar skulu vinna fram í aljtóða samfelagnum, sigur landsfundurin, at myndugleikar í høvuðsheitum skulu fylgja tilráðingum frá fiskifrøðingum, tá fiskidagatalið verður ásett. Føroyar skulu hava ein nógv størri og virknari leiklut í Norðurlandaráðnum enn higartil - innan veðurlag og stovnsrøkt av havsins ríkidømi, og samráðingar skulu takast upp við ES um treytir fyri ES-limaskapi við undantøkum. Føroyar skulu eisini arbeiða fyri at fáa fastan sess í ST, Sameindum Tjóða, sigur landsfundur Sambandsfloksins.





*Fólk hittast til prát úti á gólvinum, meðan kaffisteðgur er á landsfundinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

upp á 12,8%. Hetta eru lønarsáttmálar, sum vit beinleiðis skulu kappast við, um vit skulu gera okkum tankar um at veksa um fólkatalið í Føroyum.

Hann segði, at hesar krónur, ið skuldu gjørt okkum kappingarfør, vanta í, nú fíggjarliga rákið er vent, samstundis sum fiskivinnan er í vánaligum standi.

- Hetta er veruleikin í dag, og hetta eru fyritreytirnar, sum Føroyar skulu stýrast eftir, nú avbjóðingarnar hópa seg upp fyri framman.

### Tunlar í ellubita

Kaj Leo Johannesen nevndi eisini Sandoyartunnilin og Skálafjarðartunnilin í síni røðu og helt fyri, at hesir eru vavdir upp í ein ellubita.

- Nú kunnu hesir tunlar eisini verða við til at forkoma ætlanini um nýggjan miðnámsskúla í Marknargili. Sjálvandi hava vit ikki ráð til allar hesar íløgur, nú fyritreytirnar eru broyttar fullkomiliga.

Hann helt ikki, at samgongan nóg væl dugir at skilja millum teori, dreymar og veruleikar, tá íløgur her og nú, sum hann tók til, skulu gerast fyri tríggjar miljardir krónur.

- Ætlanin at yvirtaka fíggjareftirlitið er sambært serfrøðingum burtur úr vón og viti og eigur ikki at verða framd, segði hann.

Kaj Leo reisti eisini spurningin, um vit í veruleikanum hava snorksovið, tá ræður um at halda Føroyar á einum norðurlendskum vælferðarstøði, og hann reisti samstundis spurningin, um tað veruliga ongan mun at taka inntøkur upp á hálvatriðju miljard krónur burtur úr føroyska búskapinum?

- Vit skulu ikki góðtaka, at skattir og avgjøld verða hækkað, tí familjurnar hava meiri enn nóg mikið við at fáa endarnar at røkka.

Formaðurin endurtók høgu oljuprísirnar, hækkandi rentustøði og økta matvørukostnaðin.

- Hetta er ein hóttan, sum ikki bert er vend ímóti familjuni, men so sanniliga eisini ímóti okkara vinnulívi, sum er maskinaríið, ið skal halda samfelagið gangandi, segði Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins.

Vit fara at venda aftur til onnur viðurskifti í røðuni hjá honum í øðrum blaði.

Í blaðnum í morgin hava vit meira tilfar – og myndir - frá landsfundi Sambandsfloksins



*Politikarar og ungdómur í Sambandsflokkinum stinga høvdini saman – og seta út í kortið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*


## Handilshøli til sølu

Handilshøli á Jónas Broncks gøtu 40 er til sølu.

Liggur ógvuliga væl fyri. Stór vindeygu og beinleiðis inngongd frá Jónas Broncks gøtu. Sera góð parkeringsviðurskifti. Framsíðan er bjálva, nýliga klødd og vindeygu og hurðar eru nýggj. Suðurvendur havi við inngongd til íbúð.

**Gøtuhædd:** Handilshøli, skrivstova, goymslurúm við brúsu og vesi. Tilsamans 90 m².

**Íbúð 1. hædd:** Køkur, 2 stovur, 2 kømur, gongd, baðirúm, trappurúm til loft. Tilsamans 90 m².

**Loftið:** 1 kamar, loftið kann tildømis gerast um til eina íbúð fyri seg.

Prísur: 2,3 mió.

**Áhugaði kunnu ringja á tlf. 210405**

Mimir

AÐALFUNDUR

Aðalfundur felagsins verður leygardagin tann 10.05.08 kl. 15.00 í hølum felagsins .

Skrá smb. viðtøkum felagsins

NEVNDIN